


# Faroe Petroleum 100 millióna handil við Total

Deil:

**Jan Müller**

23.09.2014 - 10:34

Oljan.fo

Oljufelagið Faroe Petroleum, sum er sera virkið bæði í bretskum og norskum øki, hevur gjørt eina avtalu við franska kolvetnisrisan Total um 10% av Glenlivet kelduni vestan fyri Hetland.

Sáttmálin er uppá 100 mill. kr.

Tað var í 2009, at Total, DONG og Faroe Petroleum funnu Glenlivet kelduna, sum goymir nógv gass. Síðani er tað hent, at Total hevur tikið yvir leiklutin sum fyristøðufelag frá DONG og hevur 60% ognarlut í Glenlivet.

Felagið er í ferð við at úbyggja Glenlivet eins og enn eitt gassfund nærhendis, Edradour. Hesar báðar útbyggingar hava so aftur samband við stóru fyrstu gassútbyggingina vestan fyri Hetland, sum fevnir um keldurnar Laggan og Tormore, sum liggja ikki so langt frá føroyska markinum. Ein gassleiðing er løgd higani til lands, har ein nýggj gassverksmiðja skal taka ímóti fyrsta gassinum seinni. Glenlivet og Edradour keldurnar verða so knýttar í stóru gassleiðingina.

Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum sigur í eini viðmerking til søluna, at peningurin kemur væl við í sambandi við stóru boriverkætlaninar hjá felagnum aðrastaðni.

Faroe Petroleum var í mong ár partur av leitingini við Føroyar men lat síni loyvi innaftur nøkur ár herfyri og tók “timeout” frá Føroyaøkinum. Felagið hevur tó framhaldandi skrivstovu í Føroyum.